## Flokkstjórnin í Miðflokkinum skipað



Eftir landsfundin hjá Miðflokkin í Norðurlandahúsinum tann 25. oktober, hevur floksstjórn floksins nú skipað seg við Charlottu á Váli Olsen sum floksstjórnarleiðara. Varðaleiðari er Terje Vestergaard, skrivari er Arni Abrahamsen, kassameistari er Tóri Højgaard og nevndarlimur er Poul Johan Djurhuus. Formaður Miðfloksins, ið er Jenis Av Rana, er eisini fastur limur í floksstjórnini. Floksstjórnin er hægsti myndugleiki floksins millum landsfundirnar, og hevur til uppgávu at skipa og leiða floksarbeiðið. Floksstjórnin hevur eisini eitt tætt samskifti við politisku umboð floksins.

## Ítróttaravtalan er endurskoðað

Ítróttaravtalan millum Innlendismálaráðið og Ministeriet for Flygtninge, Indvandrere og Integration frá 30. september 2004 er nú endurskoðað. Eftir nýggju avtaluni kann ein útlendingur, ið hevur arbeiðs- og uppihaldsloyvi eftir ítróttaravtaluni fáa longt ítróttarloyvi í tilsamans 5 ár, í mun til 3 ár eftir gomlu avtaluni. Upphæddirnar í ítróttaravtaluni eru eisini broyttar og svara til galdandi tímalønir, sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Tað er Annika Olsen úr Fólkaflokkinum, ið varar ítróttaravtaluni.



*Líkt er ikki til, at partarnir undir samráðingunum hesaferð standa so langt frá hvørjum øðrum, at vandi er fyri nýggjum verkfalli í fiskiskipaflotanum*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

gerst so long. Hetta merkir, at fiskimenn kunnu verða revsaðir, tí teir ikki megna at gjalda sínar skyldur rættstundis, hóast teir eiga pening hjá reiðarunum.

Allir fiskimenn í langfarasigling fáa minstuløn, men henda røkkur ikki so langt, at allir klára at svara hvørjum sítt, meðan teir bíða eftir hýru.

- Vit halda, at viðurskiftini við fyribilsgjaldi av hýru eiga at koma í eina betri og tryggar legu, og vit fara tí at fylgja hesum betri upp. Vit fara eisini at rykkja reiðararnar eftir peningi fyri fiskimenn og fara at rokna rentur, tá tað dregur út at fáa hýru.

Jan sigur, at hetta hevur verið ein trupulleiki, men tað er ikki altíð, at Fiskimannafelagið fættir frá monnum, sum ikki fáa eina fyribils avrokning, sum teir sambært sáttmálanum eiga.

### Protokollát

Aftrat sáttmálanum, sum er millum Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið, finnast fleiri sonevnd protokollát, sum hava ymiskar ásetingar.

Eitt av hesum er sonevnda oljuprotokollátið, sum var nógv frammi undir seinastu samráðingum, ið endaðu við fiskimannaverkfalli. Í hesum protololláti stendur, at feløgini skulu tosa saman um møguliga luttøku í oljuútreiðslum, um oljan fer upp um eitt ávíst krónutal fyri liturin.

Jan sigur, at meðan reiðararnir hava lagt stóran dent á hetta oljuprotokollát, hevur minni verið at hoyrt um mong onnur protokollát millum feløgini, sum FF hevur sín áhuga í.

- Á okkara síðu eru protokollát um eitt nú livur, javnbýtisprosent og hvíldartíð hjá manningini. Vit hava tí saman viðgjørt spurningin um at strika øll hesi protokollát, sum kortini ikki eru løgfrøðiliga bindandi. Vit halda, at hesi bara elva til afturvendandi stríð – í samráðingum og í tíðini, sum sáttmálin er galdandi.

Sum skilst á formanninum í Fiskimannafelagnum, er felagið sinnað at strika hesi protokollát.

### Smáar broytingar

- Samanumtikið kann eg siga, at eg vænti ongar stórvegis broytingar í býtisprosentum. Reiðararnir hava onkur ynski, og vit hava eisini onkur. Tí vænti eg, at støðan á hesum øki verður status quo, tá samráðingarnar eru lidnar, sigur Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, sum ikki hevur ringar vónir um eina rímiliga skjóta semju millum partarnar.



*Fiskur er góður fyri sálina, sigur nýggj gransking*

# Fiskur er góður móti tunglyndi

**FISKUR**

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nýggj amerikansk gransking vísir, at fiskur við omega 3 er góður ímóti tunglyndi, ótta og alzheimer-sjúkuni.

Amerikanska psykiatrifelagið mælir fólki til at eta fisk, og felagið sigur, at fiskur eisini er týdningarmikil kostur fyri heila og nervaskipanina.

- Vit halda, at fólk, sum eru fongd við sálarligum trupulleikum, eitt nú tunglyndi og skizofreni, fáa nakað burtur úr at eta fisk, siga tey í Amerika. Danska felagið, Dansk Fiskebransje, hevur havt eitt serstakt átak á Fiskens Dag fyrr í hesum mánaðinum.

Við at senda eina persónliga mynd av tær, meðan tú smílist, til eina ávísa heimasíðu, hava fólk soleiðis kunnað stuðlað gransking av ymiskum sjúkum við eini 5-krónu.

# Íslendski fiskiflotin er nógv minkaður

**ÍSLAND**

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu mánaðirnar er talið av stórum og miðalstórum íslendskum fiskiførum minkað við tilsamans 58 skipum.

Samlaða talið av hesum skipum í dag er 709.

Orsøkin til minkingina í skipatalinum sigst vera, at toskakvotan undir Íslandi er minkað við út við 60.000 tonsum seinastu árini.

Tað er Fiskerforum, sum ber hesi tíðindi.

Helmingurin av íslendska fiskiflotanum fiskar til havs, meðan hin helmingurin fiskar nærri landi.



*Íslendski fiskiskipaflotin minkar, og samlaða talið av stórum og miðalstórum skipum í dag er 709*